# Handbók um kornvelting

***Korn í Norðureuropa***

Í Norðureuropa velta tey seks ymisk sløg av korni: Bygg (*Hordeum vulgare* L.), hveiti (*Triticum aestivum* L.), durumhveiti (*T.* d*urum* L.), rug (*Secale cereale* L.), havra (*Avena sativa* L.) og triticale (*xTriticosecale*). Av hesum sløgum er triticale tað nýggjasta. Tað er ein mannagjørdur blendingur frá tjúgundu øld millum hveiti og rug. Bygg er nógv tað elsta kornslagið, sum hevur verið velt í Norðureuropa og er tað slagið, sum veksur og búnast best á hesum leiðum. Í hesi handbók verður tí høvuðsdentur lagdur á bygg.

Í Føroyum hava tey velt bygg heilt frá landnámstíðini. Bygg varð velt til matna, og hóast tey ikki vóru sjálvbjargin við bygg, so hevur tað havt stóran týdning í húsarhaldinum. Veltingin helt á heilt til seinna veraldarbardaga, men aftaná kríggið fánaði veltingin so líðandi burtur í einki, og í eina hálva øld hevur at kalla einki bygg verið velt í Føroyum, fyrrenn Búnaðarstovan saman við nøkrum bóndum fór undir at gera royndir við bygg fyri nøkrum árum síðani.

Meginparturin av tí byggi, sum verður velt í Norðanlondum í dag, verður nýtt sum fóður. Tó verður nakað nýtt til baking og brygging, og ætlanin við teimum royndum, sum eru gjørdar nú, er at kanna, um bygg til matna kann gerast ein týðandi framleiðsla hjá onkrum bónda.

***Um byggplantuna***

Plantan hevur tvey sløg av rótum - høvuðsrót og krúnurøtur. Høvuðsrótin veksur beint niður úr frænum, og eftir at stelkurin er farin at grógva, vaksa krúnurøtur út úr honum til allar síður. Plantan nælir 120 samdøgursstig (døgngradir) eftir sáing, t.v.s. at samlaði miðalhitin dag fyri dag skal skal vera komin uppá 120°C (t.d. 15 dagar við 8 stigum í miðal). Ein miðal mai mánað í Føroyum kunnu vit rokna við einum 2-3 vikum frá sáing til næling.

Tá tað nælir, kemur fyrst eitt blað undan, og stutt eftir trý tey næstu. Seinni vaksa síðuskot út, eini 2-3 á hvørjari plantu. Hvørt av hesum skotum endar við einum aksi, og tí er samlaða úrtøkan av korni á einum akri tengt at, hvussu nógv síðuskot vaksa út.

Í Føroyum kemur aksið til sjóndar umleið 10 vikur eftir sáing. Vit hava tvey sløg av aksi – tvíraðað og seksraðað. Í seksraðaðum byggi eru í miðal 45 korn á hvørjum aksi sammett við 20 í tvíraðaðum. Hóast hendan mun, er tað ikki altíð, at tað seksraðaða gevur størri úrtøku, tí tey einstøku kornini í seksraðaðum, eru ójøvn til støddar. Seksraðaðað byggið er mest brúkt í norðara parti av Norðanlondum, meðan tað tvíraðaðað er tað vanligara slagið í sunnara parti.

### *Velting*

Mælt verður til at sáa 200 kg av fræ á hvønn hektara, sáðdýpi umleið 2-3 cm. Royndir í Íslandi vísa, at skjóttvaksandi og –búnandi sløg krevja 1.300 samdøgursstig, roknað frá sáing, fyri at búnast. Tí ræður um at sáa so tíðliga, sum til ber, helst í apríl og í seinasta lagi hálvan mai.

Tað er av stórum týdningi, at stykkið, sum skal nýtast til akur, er væl turrlagt (drenað). Stykkið skal pløgast og harvast væl. pH má vera í minsta lagi 5,2. Í Íslandi mæla tey til at taða við 20 kg av køvievni N, 4 kg av fosfori P og 13 kg av kalium K. Ansast má væl eftir, ikki at taða við ov nógvum køvievni, tí so seinkast búningin. Í Íslandi hava tey annars góðar royndir við at breiða handilstøðini saman við frænum. Øksini gulna meðan tey stadna. Tá tey eru vorðin gul, er turrevni uml. 55%. Síðani torna tey so líðandi, og í góðum veðri um heystið, kann turrevni koma upp í 80%, men í Føroyum eiga vit ikki at vænta at fáa so turr øks.

Í Íslandi rokna tey við, at tað ganga 45 dagar frá plantan skjýtur aks, til tað er klárt at skera. Árini eru misjøvn, og tey plaga longu í byrjanini av august at meta um, hvørt akurin fer at gerast búgvin at skera ella ikki. Vænta tey ikki, at hann verður búgvin, so velja tey at heysta í byrjanini av august sum heilgrøði, t.v.s. at sláa kornið og balla á sama hátt sum gras.

### *Turking av korni*

Fyri at tryggja gott korn, bæði til fóður og mat, er tað avgerandi neyðugt at turka kornið beint aftaná heysting. Sjálv heystingin er grundarlagið undir góðum korni. Kornið skal vera so nógv stadnað, sum gjørligt, áðrenn heystað verður, og tað skal vera turt í veðrinum, tá heystað verður, tí annars kann soppavøkstur koma í. Slíkur soppur kann gera mykotoksinir, sum kunnu vera vandamiklar bæði fyri fólk og djór.

Turkingin skal byrja beinanvegin, kornið er komið til høldar – ikki seinni enn 2-3 tímar aftaná. Kornið skal turkast í ikki ov heitari luft. Sáðkorn og korn til malt ikki hægri enn 38°C, matkorn ikki hægri enn 43° og korn til fóður ikki hægri enn 60°C. Tað er kostnaðarmikið at turka korn, tí skal tað heldur ikki turkast meira enn neyðugt. Kornið er nóg turt, tá turrevnið er komið upp á 86-88%.

Goymslan skal vera rein og turr, og flugur, onnur skordýr, rottur, mýs og onnur djór mugu haldast burtur. Meðan turkað verður, er neyðugt at halda eitt vakið eyga við hita og luftfukti bæði í rúminum og inni í kornrúgvuni.